# Bilar

Nr. 90 • mikudagur • 10. mai 2006 • 80. árgangur • www.sosialurin.fo

BMW 3 :

# Ársins bilur í øllum heiminum

**Á altjóða bilaframsýningini „New York International Automobile Show“ varð BMW 3 kosin WORLD CAR OF THE YEAR 2006. Grundgevingarnar vóru m.a. at teir um allan heimin verða mettir sum eitt ikon**

**BILAR**
*MagnusGunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*




*BMW 3 er kosin WORLD CAR OF THE YEAR 2006. Her er nýggjasti BMW 3 Coupé*

Tað vóru 46 motorjournalistar úr øllum heiminum, sum valdu BMW 3 til WORLD CAR OF THE YEAR 2006.

Bilarnir, sum eru við í hesi kapping, skulu verða seldir í størri mongdum á allari klótuni. Teir verða mettir eftir 20 ymiskum kriterium. Dentur verður t.d. lagdur á design, stíl, koyrieginleikar, komfort, brúkaravinarligheit, virði fyri pengarnar og at teir eru praktiskir og umhvørvisvinarligir.

BMW 3 varð nummar eitt framman fyri 26 aðrar bilar í kappingini um eina av heimsins mest virdu heiðurslønum, sum WORLD CAR OF THE YEAR er.

Grundgevingarnar fyri at geva BMW 3 hendan heiður vóru m.a. at teir um allan heimin verða mettir sum eitt ikon av einum vaksandi tali av bileigarum og saman við kenda kvalitetinum og góðu sportsligu koyrieginleikunum, er heildarmyndin av nýggja BMW 3 tann, at talan er um ein gjøgnumførdan bil í allar mátar.

Hesin nýggjasti er 5. generatión av BMW 3, sum hava verið á marknaðinum í 30 ár.

BMW 3 verða gjørdir í fýra ymiskum útgávum: Sedan, Touring, Coupé og Cabriolet.

Hjá Sp/f Nordcar væntar stjórin Jens Petur Jensen sær nógv av BMW 3, ið eisini hevur fingið sera góða móttøku her hjá okkum.

„AutoBild Quality Report 2006“:

# Opel besta týska bilmerki

Sambært eini kvalitetsfrágreiðing hjá týska bilmagasininum AutoBild, hava Opel tann besta kvalitetin av øllum týskum bilum.

„AutoBild Quality Report 2006“, sum frágreiðingin eitur, vurderar t.d. kvalitetin í bilinum, service, kundanøgdsemi og hvussu álítandi og feilfríur bilurin er.

Fleiri aðrar kanningar sum t.d. ein kanning hjá kenda analysustovninum J.D. Power vísti, at Opel Signum lá framman fyri allar aðrar týskar bilar.

Bilmagasinið AutoBild brúkar fleiri ymiskar mátar at koma til teirra vurderingar. Í hesi kanningini spurdu teir ikki minni enn 24.000 bileigarar.




*Sambært kvalitetsfrágreiðingini „AutoBild Quality Report 2006“, hava Opel tann besta kvalitetin av øllum týskum bilum*